†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum,
at okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Poul í Skorini**

ættaður av Eiði, búsitandi í Tórshavn

andaðist hósdagin 30. oktober, 85 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
leygardagin kl. 18.30.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer sunnudagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*

**Mia, Ragnhild, Sámal og Róland**

Tey, ið vilja minnast Poul, kunnu lata Zarepta eina peningagávu.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður,
pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Arnholt Sofus Petersen**

doyði og varð jarðaður.

Takk til personalið á deild A á Klaksvíkar sjúkrahúsi,
sum fjálgaði so væl um hann, tá ið hann lá har.
Takk tit, sum so trúliga vitjaðu hann, og øll tit,
sum hjálptu okkum so væl.
Takk fyri heilsanir, gávur, blómur og uppringingar
her og frá útlandinum.
Takk til prestarnar fyri troystarrík orð og til sangarar,
berarar og tykkum øll, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Fyri tey avvarðandi*

**Esther Petersen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt vístu
samkenslu og hjálptu í stóru sorgini, tá okkara elskaði

**Kjartan Hentze**
**á Sandi**

so brádliga varð tikin frá okkum.

Takk fyri skjóta og góða hjálp, tá vanlukkan hendi,
og umsorgan á B8 á Landssjúkrahúsinum. Troyst og
umsorgan á Glostrup Amtssjúkrahúsi og Hotel
Tórshavn. Takk til familju og vinir, ið vóru um børnini
torføru dagarnar heima og í Danmark. Takk øll tit, ið
tóku ímóti honum á flogvøllinum, í Skopun og tit,
ið mintust hann við Meginskúlan. Takk fyri hjálpina
í sambandi við jarðarferð og ervi og til stóra skaran,
ið fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Takk fyri forbønir, vitjanir, uppringingar, blómur
og minnisgávur.

**Jóhan Petur, Ida og børnini**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at
kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Hanus Thomsen**

Syðragøta

andaðist í heiminum týskvøldið 28. oktober,
74 ára gamal.

Farið verður úr heiminum leygardagin kl. 17.30 í
kirkjuna. Jarðarferðin verður sunnudagin
2. november kl. 14.00.

*Familjunna vegna*

**Jóna, Frits og Jóhan**

Tey, ið vilja minnast Hanus, kunnu lata eina gávu til
Hina føroysku Sjómansmissiónina.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu
samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða kona mín,
mamma, vermóðir og omma okkara

**Katrin Amalja Fuglø**
**Hattarvík**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á Deild A
á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

*Vegna tey avvarðandi*

**Leivur, Steingrím, Birgit, Fríðbjørg,
Erling og lítla Katrin**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, ið á ymiskan hátt
vístu samkenslu, tá kæra mamma mín

**Lena Olsen, f. Andreasen**
**ættað úr Tjørnuvík**

doyði og varð jarðað.

**Sunfríða**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu okkum
samkenslu, tá elskaða kona, mamma og omma okkara

**Maria Vágstún**
**Klaksvík**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Tøkk til deild A á Klaksvíkar sjúkrahúsið,
fyri tryggleika, umsorgan og røkt.
Tøkk til Niels Paula Danielsen prest fyri vøkur orð.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk øll tit, sum hjálptu til í sambandi við
jarðarferðina og ervið, og sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Julian, Heðin, Sigrun
og ommubørnini**

N O R Ð U R L A N D A H Ú S I Ð

# Tiltøk november 2003

**Framsýningin »Veiðimentan í Útnorðri«** letur upp 27. november í **»Den Nordatlantiske Brygge«** í Keypmannahavn. **Fotoframsýningin »Ved Hav«** hjá Arvid Sveen (N), Grete Andrea Kvaal (N) og Maria Gradin (N) er í húsinum til og við 2. november.

**Sunnudagur 2. kl. 19.30**
**Opera La Bohéme** (Giacomo Puccini)
Leikarar frá Rialto Sjónleikarahúsinum (DK) framføra Turi Olin Grimstad (Mimi), Sune Rémi Hjerrild (Rodolfo), Anna Kathrina Börjeson (Musetta) og Joachim Knop (Marcello) Anders Ahnfeldt-Rønne (DK) klaver og leikstjóri

**Fríggjadagur 7. kl. 13.00**
**Ráðstevna Vinnuhúsið** (FO) Vinnudagur
**Fríggjadagur 07. kl. 20.00**
**Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum

**Leygardagur 8. kl. 14.00**
**Fotoframsýningin »Sökandet efter Den Nordiska Gudinnan«** (FIN) letur upp. Myndir: Ilar Gunilla Persson (FIN) og Patricia Rodas (FIN)
**Leygardagur 8. kl. 18.00**
**Barna- og Ungdómskonsertin 2003** (FO). M.a. luttaka: B-Boys (DK), Nósabarnaprixvinnari 2002 og 2003 (FO) o.fl. Frásøgufólk er Angela. Innkomni peningurin fer til stuðulsarbeiði vegna »Ár teirra brekaðu«

**Mikudagur 12. kl. 20.00**
**KLIPP Filmsfelag Norðurlandahúsins** sýnir filmin »Rembrandt« Jannik Johansen, 108 min. (DK 2003). Filmurin er gjørdur yvir størsta listaránið í Danmark

**Fríggjadagur 14. kl. 20.00**
**Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum

**Leygardagur 15. kl. 15.00**
**Fyrilestrar Fráhaldsfelag Føroya** (FO) skipar fyri

**Mikudagur 19. kl. 19.30**
**Fyrilestur Turið Sigurðardóttir** (FO) um **Evu Ström** vinnaran av bókmentaheiðursløn Norðurlandaráðsins 2003. **Norrøna Felagið** (FO) skipar fyri

**Hósdagur 20. kl. 19.30**
**Konsert Orfeus Norðurlendsk trio:** Marianne Rørholm, messosopran (DK), Anette Maria Slaatto, fiól (DK) og Anne Mette Stæhr, klaver (DK). Skrá: Verk eftir Atli Heimir Sveinsson (ÍS), Sunleif Rasmussen (FO), Anders Brødsgaard (DK) og Johannes Jansson (S)

**Fríggjadagur 21. kl. 20.00**
**Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum

**Leygardagur 22. kl. 10.00**
**Norðurlendskur skeljafundur**. Fyriskipari Norðlýsið (FO)

**Sunnudagur 23. kl. 16.00**
**Konsert og fløguútgáva Eivør Pállsdóttir** (FO) og orkestur (ÍS)

**Fríggjadagur 28. kl. 08.00**
**Føroya Tele** Starvsfólkadagur
**Fríggjadagur 28. kl. 20.00**
**Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum

**Leygardagur 29. kl. 18.00**
**50 ára Jubileumskonsert Kristiliga Sangkórið (FO)**

**Sunnudagur 30. kl. 15.00**
**Bókadagur 2003** Fyriskiparar eru Rithøvundafelag Føroya (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum

***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650



# Konsert fyri buss

**Á Eirargarði 16 A býr Lillian saman við 14 øðrum búfólkum. Tað hevur enn ikki eydnast stovninum at fingið til vega bussin, tey í fleiri ár hava søkt um. Nú hava systkini hjá Lilliuni, Angela og Mark, sum bæði fáast við undirhald, tikið stig til eina barnakonsert, sum hevur til endamáls at savna pening til bussin, tey á Eirargarði ynskja sær**

INNSAVNING
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Komandi leygardag verður stór barnakonsert, har kendi danski bólkurin, B-Boys, fer at syngja. Eisini føroysk børn fara at framføra á konsertini, sum verður í Norðurlandahúsinum klokkan 18.

Tað eru systkini, Angela Petersen og Mark Joensen, ið skipa fyri konsertini. Tey ætla, at yvirskotið skal fara til ein buss til búfólkini á Eirargarði, har systir teirra, Lillian, býr.

– Eg havi í fleiri ár ynskt at fingið í lag eina barnakonsert, so føroysk børn kundu fáa møguleikan at framføra sang sín á einum rættiligum palli, og tá tað í ár er ár teirra brekaðu, hugsaði eg, at nú skuldi tað verða, sigur Angela.

### Vón við undirhald

Umframt dagliga starv sítt, sum leiðari á einum dagstovni, fæst Angela eisini við undirhald fyri børn.

Tá Angela las til pedagok, skipaði flokkurin hjá henni fyri undirhaldi fyri børnum fyri at savna pening til eina námsferð. Tað var tá, Angela fann út av, hvussu stuttligt tað er at undirhalda børnum.

– Tað er ein einastandandi uppliving at fáa børnini at flenna, og eg gjørdist fullkomiliga bitin av tí, sigur hon.

Barnasendingar hennara eru sera væl umtóktar, og í norðurlendskum høpi hevur hon fingið virðisløn fyri onkrar av teimum.

Mark starvast dagliga við at skipa fyri konsertum og tiltøkum av ymiskum slag. Hann spældi í sínari tíð við Mark No Limits og Chase, og tá sá hann, at tørvur var á, at onkur kundi skipa fyri konsertum.

Tí var tað sjálvsagt, at Angela bað beiggja sín hjálpa sær at seta konsertina upp.

– Eg hevði als ikki megnað at fingið eitt so stórt tiltak í lag uttan Mark, sigur hon.

Foreldur teirra, Arngerð og Sólmundur Joensen, hava fleiri ferðir spurt Angelu og Mark, um tey, nú tey bæði fingust við undirhald, ikki kundu skipa fyri onkrum, sum kundi verða eitt íkast til bussin til tey á Eirargarði.

Atgongumerkini, sum kosta 225 krónur, eru at fáa á bensinsølum og kunningarstovum kring landið.



*Angela og Mark saman við systur teirra, sum er rørslu- og menningartarnað. Lillian býr á Eirargarði*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bussur á ynskilistanum

**Búfólkini á Eirargarði 16 A eru at kalla ómynduggjørd. Tey hava ikki rætt til pensjón, men fáa bert lummapening. Fyri tann peningin hava tey ikki ráð at keypa handikappbussin, tey í fleiri ár hava søkt landsstýrið um**

EIRARGARÐUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Hóast tey á Eirargarði 16 A í fleiri ár hava søkt landsstýrið um ein buss til búfólkið, so er als einki hent enn.

Eirargarður má sigast at vera tyngsti stovnur hjá serforsorgini við tað, at 11 av teimum 15 búfólkunum eru koyristólbrúkarar.

– Vit hava eisini søkt Hjálpartólamiðstøðina um motorar til koyristólarnar, men har siga tey seg ikki hava skyldu at veita hjálpitól til ein stovn, sigur Bjørg Mohr, leiðari á Eirargarði.

Ikki kann sigast annað, enn at búfólkin á Eirargarði eru illa fyri. Tey hava ikki rætt til hjálpartól og hava ongan møguleika at útvega sær tey sjálvi, tí tey fáa onga pensjón.

Tann játtan, sum stovnurin fær, er ikki nóg mikið til so stórar íløgur, sum t.d. ein handikappbuss ella eldrivnar koyristólar.

### Savna inn sjálvi

Av tí, at flestu búfólkini eru í koyristóli, hava starvsfólkini ikki møguleikan at fara út við teimum, uttan at taka eyka fólk inn til arbeiðis.

Tí hevði tað verið ein øgiligur lætti, um tey høvdu ein buss, sum hoyrdi til stovnin.

– Tá høvdu vit havt møguleikan at farið út við øllum í senn, sigur Bjørg.

Sum nú er, eru tey bundin av at biðja um bil frá MBF, og tað kann við hvørt verða leingi at bíða, tí tann bussurin skal nøkta tørvin hjá fleiri stovnum.

– Til dømis hevur tað hent seg, at vit hava bíðað upp í ein tíma eftir bili aftaná eina veitslu inni í Eysturoynni, sigur Bjørg.

Hon sigur, at tað eru ikki umstøður, vit kunnu bjóða fólki í dag. Í dag verður bilurin ikki roknaður sum nakað luksus; hann er ein sjálvfylgja, sum hoyrir til nærum hvørt húsarhald.

Ein handikappbussur kostar um 400 túsund krónur. Í eina tíð hava tey á Eirargarði savnað inn fyri bussin, og eiga tey nú eini 200 túsund krónur.

Og nú verður so skipað fyri einum tiltaki aftrat til frama fyri bussin. Tað verður í Norðurlandahúsinum komandi leygardag, har kendi danski ungdómsbólkurin, B-Boys, fer at syngja.

Tað eru Angela Petersen og Mark Joensen, sum skipa fyri konsertini.

– Vit eru Angelu og Mark sera takksom fyri, at tey vilja gera eitt so stórt tiltak at stuðla okkum, sigur Bjørg Mohr at enda.



Bjørg Mohr:
*Av tí, at flestu búfólkini eru í koyristóli, hava starvsfólkini ikki møguleikan at fara út við øllum í senn. Tí hevði ein bussur, sum hoyrdi til stovnin, verið ein øgligur lætti, sigur Bjørg Mohr, leiðari á Eirargarði 16 A*
*Mynd: Jens Kristian Vang*